# Arbeiðsformaður

Søkt verður eftir arbeiðsformanni til Vestmanna Kommunu at byrja skjótast til ber ella sambært avtalu.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:

- Dagliga leiðslan av viðlíkahaldi og nýgerðum í bygdini, herundir av vegum, spillvatnleiðingum, vatnleiðingum, fríðkan av økjum, kavagrevstri, salting v.m.
- Ábyrgd av amboðum, maskinum, akførum v.m. hjá kommununi.
- Luttekur í skráseting av vegum, vatn- og spillivatnsleiðingum.
- Er leiðari hjá arbeiðsfólkunum og fríðkanartoyminum hjá kommununi.

**Fakligir førleikar:**

- hevur viðkomandi fakligan kunnleika og arbeiðsroyndir á omanfyri nevndu økjum
- hevur handverkaraútbúgving
- hevur stóra koyrikortið
- hevur kranaprógv
- hevur førleika at koyra maskinur

**Persónligir førleikar:**

- Vit ynskja, at tú ert røkin, málsøkin, fyrikomandi, hevur leiðsluroyndir og gongur undan í at menna tænastustøðið, dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.

Arbeiðsformaðurin hevur tilvísing til teknisku deild.
Viðkomandi, sum sett/-ur verður, má tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Talan er um fulltíðarstarv og lønin verður sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til teknisku deild, tlf. 770 105.

Umsóknir við møguligum viðmælum og prógvum skulu vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 20. februar 2019 kl. 12.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 8**
**Postboks 91**
**355  Vestmanna**
**ella til vestmanna@vestmanna.fo**